







# FRÍTÍÐAR-HOTELLIÐ Í DANLAND SØNDERVIG

## Talan er um eitt hav av møguleikum í Søndervig, sum liggur í Vestur-Jútlandi

Frítíðarhotelið hjá Danland í Søndervig liggur bert fáar kilometrar frá tí kenda býnum, Ringkøbing í Vestur-Jútlandi. Á leiðini kring Søndervig eru sandstrendur, so langt sum eyga røkkur. Á sjálvum hoteløkinum eru nógvir hentleikar, sum ein kann stytta sær stundir við. Skamt frá hoteløkinum eru góðar og hugnaligar matstovur. Hægsti vitin í Danmark liggur eisini í Søndervig. Um koyrt verður til kendu fiskabygdina Hvide Sande, so ber til at keypa feskt frá roykivirkinum har. Hvide Sande hevur eisini aðrar fiskahandlar við dygdargóðum fiski og skeljadjórum. Ringkøbing fjørður er eisini verdur at at uppliva. Ein bowlinghøll er eisini á staðnum, har ein kann bowla fyri eina rímuliga upphædd. Í tí innandura, subtropiska baðilandinum kunnu børnini skreiða á einari 50 metra langari øku. Í baðilandinum er eisini ein dunandi, mannagjørdur fossur, og har ber til at kríggjast við vatnkanónum. Tey smáu



kunnu trygt spæla í barnahylinum, og tey sum ynska at sleppa at svimja á einum hóvligum motiónsstøði, hava eisini ein hyl til endamálið. Aftaná kann ein velja ímillum at fara í sauna, spa ella turkiskt bað. Skal ein til handils at keypa inn, so er talan um ein tein uppá bert 300 metrar frá hoteløkinum.

## Fakta:

**Á frítíðarhotelinum hjá Danland í Søndervig kann ein m.a. finna:**

### *Innandura*

- Baðiland
- Barnahylur
- Pinkubarnahylur
- Sauna
- Spa
- Dampbað
- Solarium
- Kaffistova
- Spælirúm
- Dart
- Biljard
- Borðfótbóltur
- Bowlinghøll
- Myntvaskarí
- Fitness
- Styrkisvenjing

### *Uttandura*

- Spælipláss
- Súkklubreyt fyri smærri børn
- Trampolin
- Kurvabóltur
- Flogbóltur
- Boccia
- Petanque
- Boule
- Crocket
- Grilløki
- Talv
- Tennis
- Súkkluútleigan
- Minigolf